LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2014

29. juli 2014 – 28. juli 2015

LÓGARTÆNASTAN

# INNIHALDSYVIRLIT

1. Inngangur ... 3
2. Hagtøl løgtingsárið 2014 ... 4
2.1. Uppskot ið skulu eftirkannast av Lógartænastuni ... 4
2.2. Yvirlit yvir uppskotini ... 4
2.3. Longd á eftirkanning ... 5
3. Tøkniliga eftirkanningin ... 7
3.1. Ásetingar um tøkniliga eftirkanning ... 7
3.2. At góðkenna tøkniligar broytingar ... 7
3.3. At arbeiða í rætta skjalinum ... 8
4. Løgfrøðiliga eftirkanningin ... 9
4.1. Løgfrøðilig eftirkanning av løgtingslógum ... 9
4.1.1. Inngangur ... 10
4.1.2. Frágreiðandi heiti ... 10
4.1.3. Endamálsorðingar ... 10
4.1.4. Orðingin "til eina og hvørja tíð" ... 10
4.1.5. At seta á stovn almennar stovnar við løgtingslóg ... 11
4.1.6. Kærumøguleikar og kærufreistir ... 11
4.1.7. Talgilt samskifti ... 12
4.1.8. Innheinting av skuld til tað almenna ... 12
4.1.9. Revsing ... 12
4.1.10. Gildiskoma og virknaður ... 12
4.1.11. Skiftisreglur ... 13
4.1.12. At lóggeva út á sjóøki og uppeftir í luftina ... 13
4.2. Løgfrøðilig eftirkanning av viðmerkingunum til løgtingslógir ... 13
4.2.1. Ummæli ... 13
4.2.2. Avleiðingarnar av uppskotinum ... 14
4.2.3. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum. (Talvan) ... 14
4.3. Løgfrøðilig eftirkanning av kunngerðum ... 14
4.3.1. Inngangur og heimildarlóg ... 14
4.3.2. At endurgeva lógartekst í kunngerð ... 15
4.3.3. Frágreiðandi heiti ... 15
4.3.4. Ígildissetan av løgtingslóg við kunngerð ... 15
4.3.5. Revsing ... 15
4.3.6. Gjald ... 15
4.3.7. Talgilt samskifti ... 16
4.4. Løgfrøðilig eftirkanning av ríkislógartilmælum ... 16
4.4.1. Uppseting ... 16
4.4.2. Ígildissetan av ES fyriskipan við fólkatinglóg ... 16
4.5. Løgfrøðilig eftirkanning av uppskotum til samtyktar ... 17
4.5.1. Nær verður uppskot til samtyktar brúkt ... 17
4.5.2. Sjálv samtyktin ... 17
5. Strikumyndir ... 18

# 1. Inngangur

Í fráboðan løgmans um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, stendur, at løgmaður ráðgevur øðrum landsstýrismonnum í lógartekniskum spurningum. Við hesi heimild varð rundskriv um eftirkanning gjørt, og tað er nú aftur ásett, at frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast.

Tað er Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum. Á lógartænastuni eru fimm starvsfólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar. Arbeiðið er skipað soleiðis, at øll eru við í eftirkanningararbeiðnum. Løgfrøðingarnir hava ábyrgd av tí løgfrøðiligu eftirkanningini, meðan hini bæði starvsfólkini hava ábyrgd av tøkniligu eftirkanningini.

Rundskrivið ásetir, at løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskot og eisini, hvat Lógartænastan ikki eftirkannar. Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot.

Ársfrágreiðingin er í fýra pørtum. Ein partur er um hagtøl, sum vísa, hvussu nógv uppskot eru eftirkannað, frá hvørjum stjórnarráði ella stovni tey eru, og hvussu langa tíð eftirkanningin tók. Ein partur er um tøkniligu eftirkanningina og hvørjar trupulleikar, vit hava sæð, tá tøkniligu broytingarnar skulu góðkennast. Tað er týdningarmikið at hava mannagongdir, so ikki skeiv útgáva av uppskotinum verður send víðari í fyrisitingini.

Størsti parturin er um løgfrøðiligu eftirkanningina. Henda partin hava vit deilt í fýra undirpartar, har løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar verða viðgjørd fyri seg. Komið verður inn á orðingar og fyribrigdi, ið vit meta vera minni heppin, og sum eru komin oftast fyri. Vit greiða stutt frá hesum og grundgeva fyri, hvussu vit halda hetta eigur at verða gjørt. Seinasti parturin eru strikumyndir av gongdini í eftirkanningarárinum 2014.

Í 2014 eftirkannaði Lógartænastan tilsamans 229 uppskot. Lógartænastan brúkti 5 dagar ella minni at eftirkanna 78% av uppskotunum.

Henda ársfrágreiðing er tann fyrsta av sínum slagi. Vit halda, at tað er týdningarmikið at kunna stjórnarráðini um, hvørjar okkara royndir hava verið, og hvussu hetta fyrsta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Løgmansskrivstovan, 17. desember 2015

**Nella Festirstein**
deildarstjóri

# 2. Hagtøl løgtingsárið 2014

## 2.1. Uppskot ið skulu eftirkannast av Lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

*2.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.*

*2.2. Lógartænastan eftirkannar allar kunngerðir, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.*

Í løgtingsárinum 2014 eftirkannaði Lógartænastan tilsamans 229 uppskot frá øllum sjey stjórnarráðunum og einum stovni, sum hevur lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum. Tað er tað bara Fjarskiftiseftirlitið og Sjóvinnustýrið sum hava hesa heimild.

## 2.2. Yvirlit yvir uppskotini

| Løgmansskrivstovan | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 0 |
| Kunngerðir | 0 |
| Broytingarlógir | 2 |
| Broytingarkunngerðir | 0 |
| Ríkislógartilmæli | 0 |
| Uppskot til samtyktar | 3 |
| Fráboðan frá løgmanni | 1 |
| ***Íalt*** | ***6*** |

| Fíggjarmálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 5 |
| Kunngerðir | 8 |
| Broytingarlógir | 16 |
| Broytingarkunngerðir | 1 |
| Ríkislógartilmæli | 19 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| | |
| ***Íalt*** | ***49*** |

| Vinnumálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 2 |
| Kunngerðir | 11 |
| Broytingarlógir | 19 |
| Broytingarkunngerðir | 6 |
| Ríkislógartilmæli | 6 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| ***Íalt*** | ***44*** |

| Fiskimálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 4 |
| Kunngerðir | 29 |
| Broytingarlógir | 6 |
| Broytingarkunngerðir | 14 |
| Ríkislógartilmæli | 0 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| ***Íalt*** | ***53*** |

| Mentamálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 6 |
| Kunngerðir | 7 |
| Broytingarlógir | 10 |
| Broytingarkunngerðir | 3 |
| Ríkislógartilmæli | 0 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| ***Íalt*** | ***26*** |

| Almannamálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 0 |
| Kunngerðir | 1 |
| Broytingarlógir | 15 |
| Broytingarkunngerðir | 2 |
| Ríkislógartilmæli | 0 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| ***Íalt*** | ***18*** |

| Heilsumálaráðið | |
|---|---|
| Løgtingslógir | 2 |
| Kunngerðir | 9 |
| Broytingarlógir | 7 |
| Broytingarkunngerðir | 9 |
| Ríkislógartilmæli | 2 |
| Uppskot til samtyktar | 0 |
| ***Íalt*** | ***29*** |

| Annað | |
|---|---|
| Kunngerðir frá Fjarskiftiseftirlitinum | 4 |

| | |
|---|---|
| **Eftirkanningar íalt** | **229** |

## 2.3. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> *3.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá Lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.*

Í eftirkanningarárinum 2014 blivu beint undir 78% av øllum uppskotunum eftirkannaði upp á 5 dagar ella minni, ið er minst ásetta tíðin, sum Lógartænastan skal hava, fyri at kunna eftirkanna uppskot.

| **Longd á eftirkanning** | | |
|---|---|---|
| | ***Tal av uppskotum*** | ***%*** |
| 1-5 dagar | 178 | 77,7 |
| 6-8 dagar | 32 | 14,0 |
| 9-X dagar | 19 | 8,3 |
| **Uppskot í alt** | **229** | **100,0** |


Nøgd av uppskotum
Fjarskiftiseftirlitið 2%
Løgmansskrivstovan 3%
Heilsumálaráðið 13%
Fíggjarmálaráðið 21%
Almannamálaráðið 8%
Mentamálaráðið 11%
Vinnumálaráðið 19%
Fiskimálaráðið 23%


Slag av uppskotum
Uppskot til samtyktar 1%
Løgtingslógir 8%
Ríkislógartilmæli 12%
Fráboðan frá løgmanni 1%
Broytingarkunngerðir 15%
Kunngerðir 30%
Broytingarlógir 33%


Longd á eftirkanning
9-X dagar 8%
6-8 dagar 14%
1-5 dagar 78%

# 3. Tøkniliga eftirkanningin

## 3.1. Ásetingar um tøkniliga eftirkanning

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

*5.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir viðkomandi rundskrivum og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.*

*5.2. Er avvarðandi stjórnarráð og Lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til Lógartænastuna hesum viðvíkjandi.*

Inntil 1. mars 2015 vóru hesi rundskriv og vegleiðingar:

1) Rundskriv um lógasmíð frá 29. februar 2000.
2) Rundskriv um uppsetan av broytingum í løgtingslógum dagfest 17. apríl 2012.
3) Vegleiðing um uppseting av løgtingslógaruppskotum og broytingaruppskotum dagfest 24. juni 2002.
4) Vegleiðing um uppseting av kunngerðum og broytingarkunngerðum dagfest 6. februar 2003.

Frá 1. mars 2015 er einans hetta rundskrivið galdandi:

Rundskriv um uppseting og broyting av løgtingslógum og kunngerðum, um uppseting av ríkislógartilmælum og um uppseting av uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini.

## 3.2. At góðkenna tøkniligar broytingar

Rundskrivið um uppseting og broyting av løgtingslógum o.ø. inniheldur rættiliga neyvar ásetingar og dømi um, hvussu uppskot skulu tilevnast tøkniliga. Rundskrivið inniheldur tó ikki allar hugsandi møguleikar og dømi. Er dømið nevnt í rundskrivinum, so skal tøkniliga uppsetingin av hesum fylgjast. Er dømið ikki nevnt í rundskrivinum, eiga stjórnarráðið og Lógartænastan at samskifta um, hvussu hetta best verður loyst tøkniliga. Soleiðis kann eisini hetta dømið koma við í næstu útgávuni av rundskrivinum.

Okkara fatan er, at stjórnarráðini taka tær tøkniligu viðmerkingarnar hjá Lógartænastuni til eftirtektar. Men vit hava varhugan av, at øll duga ikki eins væl at nýta programmið Word, tá tað ræður um at góðtaka tær tøkniligu broytingarnar o.a. Vit mæla tí til, at stjórnarráðini brúka tað skjalið, sum Lógartænastan hevur rættað í, at arbeiða víðari við. Tað vísir seg at vera trupult uttan feilir at skriva av tøkniligu broytingarnar yvir í eitt skjal, sum ein sjálvur nýtir.

Lógartænastan hevur gjørt eina vegleiðing um, hvussu tøkniligar rættingar verða góðtiknir í Word.

Vegleiðingin er: [Vegleiðing um góðkenning av tøkniligum broytingum]

### 3.3. At arbeiða í rætta skjalinum

Frá tí at eitt uppskot byrjar hjá einum fulltrúa, og til tað er samtykt á Løgtingi, staðfest av Løgmanni og kunngjørt, hevur skjalið, sum uppskotið varð skrivað í, verið ígjøgnum eina rúgvu av rættingum og tillagingum, sum eru gjørdar av fleiri ymiskum persónum ymsastaðni í gongdini. Hetta kann gera tað trupult at halda skil á, hvør rætta útgávan av skjalinum er. Tí er gott, um stjórnarráðini hava greiðar mannagongdir um, hvør sendir skjølini víðari í tilgongdini, og hvør hevur ábyrgd av, at skjalið, ið arbeitt verður í, altíð er tann rætta útgávan av uppskotinum.

Ein hugsað gongd av ferðini hjá einum uppskoti kundi sæð soleiðis út:

Fulltrúi > skrivari > eftirkanning > skrivari > fulltrúi > skrivari > landsstýrisfund > skrivari > løgtingsumsitingin > skrivari > fulltrúi > skrivari > løgtingsumsitingin > løgmaður.

Sannlíkt er gongdin ikki eins einføld sum hendan omanfyri. Tískil er alneyðugt, at tað er ein (1) ábyrgdarpersónur fyri skjalinum, og at hesin altíð kannar eftir eina eyka ferð, at tað nú er tað rætta skjalið, sum arbeitt verður í, og sum verður sent víðari í gongdini.

Tað er fleiri ferð komið fyri, at lógaruppskot, sum er latið løgtingsumsitingin, ikki eru tøkniliga røtt, og at tær tøkniligu broytingarnar, sum Lógartænastan viðmælti í síni eftirkanning, ikki eru tiknar við.

Somuleiðis er tað eisini komið fyri, at kunngerðir, sum vit fáa til kunngering, ikki eru tøkniliga rættar, og at tær tøkniligu broytingarnar, sum Lógartænastan viðmælti í síni eftirkanning, ikki eru tiknar við í skjalið.

Hetta rokna vit kemur av, at bland er komin í tey ymsu skjølini.

# 4. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

*2.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.*

*2.2. Lógartænastan eftirkannar allar kunngerðir, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.*

Vit fara her at taka fram nøkur av teimum evnum, ið vit hava sæð fleiri ferð í hesum tingárinum. Vit hava valt at deila henda partin upp í fýra undirpartar. Ein um løgtingslógir, ein um kunngerðir, ein um ríkislógartilmæli og ein um uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini. Hetta tí at tað kunnu vera ymisk løgfrøðilig krøv til tey somu evnini, alt eftir um tey verða ásett í løgtingslóg ella í kunngerð o.s.fr.

Kunngerðir krevja t.d. heimild í løgtingslóg, og tey mest víðfevndu inntrivini, so sum revsing, gjald og tyngjandi afturvirkandi virknaður, krevja beinleiðis heimild í løgtingslóg. Nøkur evni kunnu ikki ásetast í kunngerð, t.d. skattur og avgjøld. Fyri løgtingslógir er avgerandi, at løgtingslógin ikki má ganga ímóti omanfyristandandi lóg, so sum Stýrisskipan Føroya.

## 4.1. Løgfrøðilig eftirkanning av løgtingslógum

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

*6.2. <u>Løgtingslógir:</u> Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeisku mannarættindini, revsilóg, fyrisitingarlóg, lóg um alment innlit og lóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.*

*6.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, útpantningsreglur, fyrisitingarligar sektir, eftirlitsásetingar, revsireglur, gildiskomureglur, skiftisreglur, kærureglur o.tíl.*

### 4.1.1. Inngangur

Í innganginum til broytingarlógir skulu allar broytingar í løgtingslógini nevnast. Tað eigur ikki at verða skrivað: "...sum seinast broytt við". Er lógin broytt 10 ferðir ella fleiri, er tó gjørligt at nýta orðingina "sum seinast broytt við".

### 4.1.2. Frágreiðandi heiti

Allar broytingarlógir eiga at hava eitt frágreiðandi heiti. Hetta heitið skal stutt og greitt lýsa, hvørjar høvuðsbroytingar broytingarlógin inniheldur. Heitið skal ikki vera innihaldsleyst sum t.d. (Rættingar), (Broytingar), (Tillagingar) o.s.fr. Tað ger einki, um heitið er eitt sindur langt, tá hetta er neyðugt, men tað skal tó ansast eftir, at frágreiðandi heitið ikki verður óneyðuga langt. Ansast má eftir, at heitið ikki er misvísandi.

Okkara royndir eru, at øll stjórnarráð hava tikið væl ímóti tilmælinum um at hava frágreiðandi heiti til broytingarlógir og broytingarkunngerðir.

### 4.1.3. Endamálsorðingar

Ein løgtingslóg ásetur rættindi og skyldur. Endamálsorðingar sum ikki kunnu hondhevjast, tí tær eru almennar orðingar, sum ikki áseta rættindi ella skyldur, eiga tí ikki at vera í sjálvari lógini.

Dømi um slíkar endamálsorðingar eru t.d. ferðslulógin § 1, stk. 2: *"Endamálið við ferðslulógini er, at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein av ferðsluvanlukku í vegaflutningsskipanini."* ella § 1 í rúsdrekkalógini: *Endamálið við hesi lóg miðar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið, og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum."*

Slíkar endamálsorðingar eiga heldur at standa í teimum almennu viðmerkingunum í kapittul 1 til løgtingslógina.

### 4.1.4. Orðingin "til eina og hvørja tíð"

Tað kemur fyri, at útlendsk lóggáva verður beinleiðis endurgivin í einum lógaruppskoti, ella at tað verður víst til útlendska lóggávu, sum skal galda í Føroyum sum løgtingslóg. Tá skal havast í huga, at tað er tann orðingin av útlendsku lógini, sum er galdandi, tá løgtingslógin kemur í gildi, sum verður galdandi í Føroyum.

Verður útlendska lógin seinni dagførd ella broytt, verður henda dagføring ella broyting ikki av sær sjálvum galdandi í Føroyum. Um dagføring ella broyting, sum er gjørd í útlendsku lógini, eisini skal galda í Føroyum, má hetta gerast við eini broyting í løgtingslógini.

Tað ber ikki til at áseta, at tann "til eina og hvørja tíð" galdandi útlendska lóggáva eisini skal vera galdandi í Føroyum. Slík orðing verður mett at vera brot á Stýrisskipan Føroya § 1, 1. pkt. Sama er galdandi fyri eina orðing sum "við seinni tillaging".

Sum dømi kann nevnast, at í kunngerð um heilivágsskrá og fyrimyndarreglur fyri heilivág varð í eftirkanningini mælt frá at áseta, at "*Við føroyska farmakopé er at skilja tann til eina og hvørja tíð í Danmark galdandi útgávan av Danske Lægemiddelstandarder.*" Heilsumálaráðið tók hetta til eftirtektar og broytti orðingina til: *"Við føroyska farmakopé er at skilja Danska Lægemiddelstandarder 2015.1."*

### 4.1.5. At seta á stovn almennar stovnar við løgtingslóg

Tað er ikki neyðugt við løgtingslóg, um ein landsstýrismaður vil seta á stovn ein almennan stovn. Tað er neyðugt at hava játtan á fíggjarlógini, men tað er ikki neyðugt at áseta sjálva skipanina av stovninum í løgtingslóg, sum t.d. heimildir og arbeiðsuppgávur hjá einum stovnsstjóra o.tíl. Hetta er ein fyrisitingarlig uppgáva, sum sitandi landsstýrismaður hevur heimild at avgera, og sum tað ikki er neyðugt at leggja fyri Løgtingið. Hetta er at blanda saman útinnandi og lóggevandi vald.

Tað verður tí mælt frá at áseta nakað í løgtingslóg, sum landsstýrismaðurin longu hevur heimild til at útinna uttan løgtingslóg. Einans um nýggi stovnurin í sínum virki hevur brúk fyri heimildum, sum krevja heimild í løgtingslóg, t.d. útgjald av veitingum, at taka gjald, gera inntriv mótvegis borgarum o.tíl., er neyðugt at leggja málið fyri Løgtingið.

Løgtingið ásetir hvørji rættindi og skyldur borgarar hava, og í eini lóg kann tá eisini verða ásett, hvør skal umsita slíka lóg. Men ein lóg, sum ikki inniheldur rættindi ella skyldur fyri borgarar, eigur ikki at vera løgd fyri Løgtingið.

### 4.1.6. Kærumøguleikar og kærufreistir

Fyrisitingarrætturin ásetur, at um einki annað stendur í lógini um kæru, so kunnu avgerðir, sum eru tiknar av einum undirskipaðum stovni, kærast til avvarandi landsstýrismann. Avgerðin hjá landsstýrismanninum er endalig innan fyrisitingina.

Er ætlanin at landsstýrismaðurin skal leggja sínar fyrisitingarligar heimildir til ein undirskipaðan stovn, eigur samstundis í lógaruppskotinum at vera tikið støða til, um avgerðirnar hjá undirskipaða stovninum skulu kunna kærast til landsstýrismannin ella til eina kærunevnd. Tað krevst beinleiðis heimild í lóg at leggja kærumyndugleikan til eina kærunevnd og at skerja kærumøguleika upp til landsstýrismannin.

Tað eigur eisini at vera sett tíðarfreist fyri, nær ein kæra skal vera latin inn. Er eingin kærufreist ásett, kann ein kæra altíð vera latin inn. Hon kann tískil í ástøðini latast inn fleiri ár eftir, at sjálv avgerðir varð tikin. Vanliga er kærufreistin 4 vikur.

### 4.1.7. Talgilt samskifti

Um tað skal vera kravt av borgara ella fyritøku, at viðkomandi skal samskifta við almennu fyrisitingina talgilt, krevur hetta heimild í lóg. Tað er tí ikki gjørligt hjá almennum myndugleika t.d. einans við eini áseting í kunngerð at krevja, at samskifti við myndugleikan skal vera talgilt.

### 4.1.8. Innheinting av skuld til tað almenna

Almennir myndugleika ynskja sær javnan heimild at innheinta skuld til tað almenna við, at TAKS fær loyvi til at eftirhalda í lønini hjá skuldaranum, til skuldin er goldin. Hetta er eitt tvingsilsinntriv, sum krevur beinleiðis heimild í lóg.

TAKS eftirheldur í lønuni sambært reglunum í § 136 í skattalógini. Áðrenn TAKS kann eftirhalda í lønini skal skuldin vera fallin, og skuldarin skal hava fráboðan um, at eftirhald verður sett í verk. Eftirhald kann saman við eftirhalding av A-skatti í mesta lagi vera 65% av A-inntøkuni.

Hetta er eitt sera víðfevnt tvingsilsinntriv, sum tí eigur at vera væl umhugsað. Sum meginregla eigur at vera talan um slag av skuld, sum nógvir persónar kunnu hava, t.d. mvg, barnapening o.tíl. Um talan einans er um nøkur einstøk peningakrøv og fáar persónar eigur slík víðfevnd heimild ikki at vera sett inn í lógina.

### 4.1.9. Revsing

Tá revsing verður ásett í løgtingslóg skal orðing sum "brot á hesa løgtingslóg verða revsað við..." ikki verða brúkt. Tað skal greitt vísast til, hvørjar ásetingar í lógini ein kann revsast fyri. Um tað er ymisk revsing fyri brot á ásetingarnar, t.d. bót og fongsul, skal eisini skiljast ímillum, hvørjar ásetingar kunnu revsast við bót og hvørjar við fongsul.

### 4.1.10. Gildiskoma og virknaður

Her eigur at verða umhugsað, um lógin skal koma í gildi dagin eftir kunngering, ella um hon skal koma í gildi ávísa dagfesting. Er innihaldið í lógini av slíkum slag, at tað er týdningarmikið at síggja, hvør var fevndur av gomlu ásetingunum, og hvør verður fevndur av nýggju ásetingunum, eigur lógin at vera sett í gildi ein ávísan dag, t.d. 1. januar, 1. juli, o.s.fr. Í slíkum lógum vil oftani eisini vera neyðugt við skiftisreglum.

Tá orðið "virknaður" verður nýtt í gildiskomureglum skal minnast til, at virknaður bert er aftur í tíð. Hevur lógin ikki virknað aftur í tíð, verður orðið "virknaður" ikki nýtt, men í staðin verður ásett nær lógin kemur í gildi.

Vit hava sæð fleiri dømi har gildiskoman er ásett soleiðis, at lógin skal koma í gildi dagin eftir kunngerð (t.d. 3. mai), men hava virknað frá 1. oktober. Tá eigur gildiskoman at vera ásett soleiðis, at lógin kemur í gildi 1. oktober. (hóast hon verður kunngjørt t.d. 3. mai)

### 4.1.11. Skiftisreglur

Tá nýggj lóg avloysir gamla lóg, ella tá broytingar verða gjørdar í lóg, skal altíð umhugsast, um tað er neyðugt við skiftisreglum. Um t.d. ein skipan verður broytt, har fólk longu eru partur av hesi skipan, er tað neyðugt at áseta, um broytingin eisini skal galda fyri tey, sum longu eru í skipanini, ella bert fyri tey nýggju, sum koma inn í skipanina.

### 4.1.12. At lóggeva út á sjóøki og uppeftir í luftina

Ein løgtingslóg er sum útgangsstøði galdandi út á 12 fjórðingar á sjónum frá føroysku grundlinjuni og har frá beint uppeftir í loft og út til byrjanina av rúmdini. Hon er galdandi fyri føroysk før, bæði sjófør og flogfør, innan hetta økið, og eisini galdandi fyri føroysk før uttan fyri hetta økið. Hon er sum útgangsstøði eisini galdandi fyri fremmand før innan fyri 12 fjórðingar.

Vit hava tó í ymsum millumtjóða sáttmálum valt at skerja henda rætt at lóggeva. Serliga er tað Havrættarsáttmálin, ið her er viðkomandi. Í Havrættarsáttmálanum er m.a. ásett, at sjófør hava rætt til frítt at sigla gjøgnum økið millum grundlinjuna og 12 fjórðinga markið. Somuleiðis eru serreglur um, hvussu farast skal fram, tá revsirættarlig ella borgaralig átøk verða gjørd móti sjóførum, sí artikkul 27 og 28.

Tá tað kemur til loftrúmið, so hava Føroyar ikki yvirtikið økið flogferðsla, sí § 1, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum. Tískil kunnu føroyskir myndugleikar ikki einsamallir lóggeva á hesum øki, men hetta kann gerast við, at Løgtingið heitir á ríkismyndugleikarnar um at seta í gildi fyri Føroyar ávísa lóggávu.

Tað má vísast varsemi við at lóggeva á hesum økjum, tí sambært løgtingslóg um stýrisskipan Føroya § 55, hava løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, ikki gildi, um
a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmørk hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

## 4.2. Løgfrøðilig eftirkanning av viðmerkingunum til løgtingslógir

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

*6.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri Løgting og borgaran, at sundurbýti í lógargreinir, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.*

### 4.2.1. Ummæli

Uppskot eiga altíð at vera send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og er vanliga tíðarfreistin at lata inn ummæli 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd, uttan so at tað

er átrokandi neyðugt. Hevur uppskot ikki verið sent til ummælis, ella er ummælisfreistin stytt, skal greiðast frá í viðmerkingunum, hví so er.

Nýggjur ummælisportalur er júst tikin í nýtslu, har øll uppskot hjá stjórnarráðunum vera at finna. Herumframt senda stjórnarráðini sjálvsagt sum vant eisini uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

Ummælisportalurin liggur her: http://www.foroyalandsstyri.fo/landsstyrid/uppskot-til-ummaelis/

Okkara royndir eru, at tað eru alt ov nógv lógaruppskot, sum ikki verða send til ummælis áðrenn eftirkanning, ella har ummælisfreistin er ov stutt. Hetta kann hava við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verðið.

### 4.2.2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Tá greitt verður frá avleiðingunum av uppskotinum skal minnast til, at avleiðingarnar kunnu eisini vera positivar ella jaligar.

### 4.2.3. Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum. (Talvan)

Í talvuni er bert møguligt at svara "Ja" ella "Nei". Ikki er møguligt at svara "Ja/Nei" o.tíl. Tað skal svarast "Ja" ella "Nei" í hvønn einstaka punt í talvuni.

### 4.3. Løgfrøðilig eftirkanning av kunngerðum

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *6.6. Kunngerðir: Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.*

### 4.3.1. Inngangur og heimildarlóg

Í innganginum til kunngerðir verður einans víst til broytingar, har sjálv heimildarásetingin í lógini er broytt, og ikki nær lógin er broytt.

Tá tað í kunngerð verður víst til ásetingar í heimildarlógini verður skrivað: "sambært § x í løgtingslógini". Verður víst til ásetingar í aðrari lóg verður skrivað: "sambært § x í løgtingslóg um ...".

### 4.3.2. At endurgeva lógartekst í kunngerð

Meginreglan er, at tað er óneyðugt at endurgeva lógartekst í kunngerðum. Men um tað bøtir um gjøgnumskygni um, hvat er galdandi, og um tað beinleiðis kann vera misvísandi ikki at vísa til lógarásetingarnar, so ber til at víkja frá hesi meginreglu.

Um lógartekstur verður endurgivin í kunngerð, skal hesin endurgevast orðarætt og við tílvísing til lógarásetingina, sum t.d. " Sambært § x í løgtingslóg um ... skal ..."

### 4.3.3. Frágreiðandi heiti

Eins og broytingarlógir eiga allar broytingarkunngerðir at hava eitt frágreiðandi heiti. Hetta heitið skal stutt og greitt lýsa, hvørjar høvuðsbroytingar broytingarkunngerðin inniheldur. Heitið skal ikki vera innihaldsleyst sum t.d. (Rættingar), (Broytingar), (Tillagingar) o.s.fr. Tað ger einki, um heitið er eitt sindur langt, tá hetta er neyðugt, men tað skal tó ansast eftir, at frágreiðandi heitið ikki verður óneyðuga langt. Ansast má eftir, at heitið ikki er misvísandi.

Okkara royndir eru, at øll stjórnarráð hava tikið væl ímóti tilmælinum um at hava frágreiðandi heiti til broytingarlógir og broytingarkunngerðir.

### 4.3.4. Ígildissetan av løgtingslóg við kunngerð

Viðhvørt skal landsstýrismaðurin hava heimild til seinni at seta eina løgtingslóg í gildi, tí gildiskoman er tengd at øðrum viðurskiftum, sum ikki eru klár, tá lógin verður samtykt.

Meginreglan er at øll lógin verður sett í gildi í einum. Heimild til at seta løgtingslóg í gildi við kunngerð kann bara brúkast eina ferð. Tað skal havast í huga, um lógaruppskot hava slíkar ásetingar.

Útseting av gildiskomu eigur bara at verða nýtt í undantaksføri. Sí rundskriv nr. 3.1.3.

### 4.3.5. Revsing

Ásetingar um revsing í kunngerð, bót ella fongsul, kunnu bert ásetast, um hetta er beinleiðis heimilað í heimildarlógini. Verður revsing ásett, skal tað neyvt vísast til tær ásetingarnar, sum kunnu viðføra revsing. Tað er ikki gjørligt einans at áseta, at "brot á hesa kunngerð verður revsað...".

### 4.3.6. Gjald

Fyri at kunna áseta gjald í kunngerð krevst beinleiðis heimild í heimildarlógini. Eitt gjald má ikki ásetast hægri enn veruligi kostnaðurin fyri ta tænastu, veiting o.tíl., ið gjaldið er fyri. Meginreglan er at øll gjalda tað sama fyri somu tænastu.

Stjórnarráðið má kunnu grundgeva fyri, hví tað metir, at gjaldið er innanfyri henda kostnað.

### 4.3.7. Talgilt samskifti

Skal tað í kunngerð ásetast krav um, at borgarar og fyritøkur skulu samskifta við almennu fyrisitingina talgilt, krevst beinleiðis heimild fyri hesum í lóg.

## 4.4. Løgfrøðilig eftirkanning av ríkislógartilmælum

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *6.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.*

### 4.4.1. Uppseting

Hetta er fyrsta árið, har vit hava roynt at hava ein fastan leist til uppseting av ríkislógartilmælum. Royndirnar hetta árið hava víst, at vit ikki enn hava funnið endaliga leistin. Flestu spurningarnir hava verið um lógaruppskotið skal setast beinleiðis inn í ríkislógartilmæli ella viðfestast sum skjal. Gongdin sýnist at vera at velja at skriva lógaruppskotið beinleiðis inn í ríkislógartilmæli, heldur enn at viðfesta tað sum skjal.

Vit hava eitt gott samskifti við Løgtingsumsitingina um hesi viðurskifti, sum tí væntandi skjótt koma upp á pláss.

### 4.4.2. Ígildissetan av ES fyriskipan við fólkatinglóg

Eitt serstakt mál í hesi tingsetuni var ríkislogartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Lov for Færøerne om kapitalkrav og tilsynsmæssige krav for kreditinstitutter og investeringsselskaber (tingmál nr. 115/2014).

Spurningurin var, hvussu ein ES fyriskipan kundi setast í gildi fyri Føroyar.

Í hesum førinum var nevnda ES fyriskipanin beinleiðis galdandi í Danmark; tað var tí ikki neyðugt fyri Danmarkar viðkomandi, at Fólkatingið samtykti eina ríkislóg fyri at implementera fyriskipanina. Men skuldi fyriskipanin galda fyri Føroyar var neyðugt, at Fólkatingið samtykti hetta við eini ríkislóg.

Hetta varð gjørt soleiðis, at fólkatingslógin skuldi heimilað ríkismyndugleikunum at seta ES fyriskipan "om kapitalkrav og tilsynsmæssige krav for kreditinstitutter og investeringsselskaber" (CRR-fyriskipanin) í gildi í Føroyum. Sjálv fyriskipanin var viðfest sum skjal til lógina og var sostatt ein beinleiðis partur av lógini.

Leisturin, sum hetta varð gjørt eftir, líkist tí mannagongd, sum verður brúkt, tá ríkislógir verða settar í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan. Tvs. at ein ríkislóg heimilar einum ráðharra at seta í gildi ríkislóg í Føroyum.

Í § 1 varð ásett, at fyriskipanin skuldi galda fyri Føroyar. Eins og gjørt verður viðvíkjandi anordningsheimildum í ríkislógum varð í § 2 ásett, at ráðharrin hevði heimild at áseta reglur, sum tillagaðu fyriskipanina til føroysk viðurskifti.

Avgerðir og rættarskjøl hjá ES stovnum o.tíl. sambært ES fyriskipanini kunnu ikki galda beinleiðis í Føroyum. Tað var tí í § 3 ásett, at ráðharrin við kunngerð kundi áseta slíkar reglur, sum vóru neyðugur fyri at fremja slíkar avgerðir og rættarskjøl.

Hesin hátturin at seta ES reglur í gildi í Føroyum má sigast at vera ein neyðloysn, tí tað vóru ikki stundir til at gera tað á vanligan hátt.

Tað hevði verið betri um tað í einum slíkum føri varð gjørd ein Lov for Færøerne om kapitalkrav og tilsynsmæssige krav for kreditinstitutter og investeringsselskaber, og har innihaldið í ES fyriskipanini varð skrivað inn í lógina og ikki bara viðfest sum skjal.

Eftirfylgjandi hava vit umrødd hetta málið við Justitsministeriet, og vit eru samd um, at hetta ikki er ein háttur, sum eigur at vera brúktur sum fyridømi, um aðrar ES fyriskipanir verða settar í gildi fyri Føroyar.

Tá eigur hetta at vera gjørt við, at ES fyriskipanin verður implementerað í eina fólkatingslóg fyri Føroyar.

### 4.5. Løgfrøðilig eftirkanning av uppskotum til samtyktar

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> *6.10. <u>Uppskot til samtyktar:</u> Uppskot til samtyktar hjá landsfyrisitingini eru serliga tey mál, har Løgtingið skal góðkenna millumtjóðasáttmálar sbrt. stýrisskipanarlógini § 52, stk. 2. Eftirkannað verður serliga, um góðkenningin ger, at tað er neyðugt at gera lógarbroytingar, fyri at sáttmálin kann verða útintur.*

#### 4.5.1. Nær verður uppskot til samtyktar brúkt

Uppskot til samtyktar frá landsfyrisitingini eru serliga tey mál, har tað er neyðugt hjá landsstýrinum at fáa góðkenning frá Løgtinginum sambært stýrisskipanarlógini § 52, stk. 2 at gera avtalur við onnur lond ella fáa heimild at mæla til at seta í gildi fyri Føroyar millumtjóðasáttmálar.

#### 4.5.2. Sjálv samtyktin

Við uppskotum til samtyktar er tað orðingin av sjálvari samtyktini, sum er tað týdningarmiklasta.

Heimildin til landsstýrið er bara tað, sum stendur í sjálvari samtyktini, ikki í viðmerkingunum.